# Føroyingar skulu brynja seg við toli

**Spurningurin um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum tekur tíð at loysa, tí tað er ikki nakað, sum Norðurlandaráðið einsamalt kann taka avgerð, sigur forsetin í ráðnum, Rannveig Gudmundsdóttir**

NORÐURLANDARÁÐIÐ

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Rannveig Gudmundsdóttir, forseti í Norðurlandaráðnum heilsar her upp á limirnar í formansskapinum í Útnorðurráðnum. Fremstur í myndini er Henrik Old, løgtingsmaður, sum er formaður í Útnorðurráðnum*

*Mynd: Johannes Jansson / norden.org*

Málið hevur verið til viðgerðar undir fundinum í Norðurlandaráðnum, sum er í Reykjavík í hesum døgum. Í hesum sambandi hevur ein fundur verið á skránni millum formansskapirnar í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum.

### Eisini ein spurningur fyri ríkisfelagsskapin

Á fundinum millum teir báðar formansskapirnar greiddi Rannveig Gudmundsdóttir frá, at spurningurin um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum hevur verið umrøddur á einum fundi millum formansskapin í Norðurlandaráðnum og teir norðurlendsku forsætismálaráðharrarnar.

Rannveig Gudmundsdóttir greiddi Útnorðurráðnum frá, at talan er ikki um eitt mál, sum Norðurlandaráðið einsamalt kann taka støðu til. Talan er eisini um ein spurning fyri danska ríkisfelagsskapin, samstundis sum at talan er bundin av Helsinki-sáttmálanum, sum tað norðurlendska samstarvið byggir á. Tískil skulu teir norðurlendsku forsætismálaráðharrarnir eisini takast upp á ráð.

Forsetin í Norðurlandaráðnum greiddi frá, at teir norðurlendsku forsætismálaráðharrarnir ynskja, at tey norðurlendsku sjálvstýrisøkini fáa best møguligu umboðanina í norðurlendskum samstarvi, og at tiltøk skulu setast í verk at tryggja hetta.

### Evnisdag um veðurlagsbroytingar

Formaður í Útnorðurráðnum er løgtingslimurin Henrik Old úr Javnaðarflokkinum. Á fundinum við formansskapin í Norðurlandaráðnum legði Henrik Old dent á, at samferðsla, ferðavinna og umhvørvi eru millum tey týdningarmiklastu felags áhugamálini í Útnorðuri. Veðurlagsbroytingar kunnu hava stóra ávirkan á umhvørvi og tað livandi tilfeingi í Útnorðuri, og tað er vert at leggja sær í geyma, at búskapurin í londunum í útnorðuri í høvuðsheitinum byggir á fiskivinnu. Tí hevur Útnorðurráðið gjørt av at hava ein evnisdag um veðurlagsbroytingar og fylgirnar av hesum fyri londini í útnorðuri.

Eisini hevur Útnorðurráðið valt ferðavinnu sum evni fyri komandi ár, og hæddarpunktið í hesum sambandi verður ein stór ráðstevna, sum verður í Manitsoq í Grønlandi í juni mánað.

Eftir fundin millum formansskapirnar báðar segði Rannveig Gudmundsdóttir, at ráðini høvdu avgjørt at styrkja samstarvið partana millum fyri at tryggja sær, at fíggjarliga orkan varð gagnnýtt skilabetur, og at at talan ikki gjørdist um sonevnt "dupultarbeiði".

# Dekkverktstøðini úr at gera

**Um vikuskiftið var fyrsta veruliga hálkan í vetur, og sum vant er, hevur tað havt við sær, at dekkverkstøðini kring landið hava havt úr at gera í vikuni**

DEKK

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Dekkverkstøðini hava havt úr at gera seinastu dagarnar. Her fær ein persónbilur ásett nýggj vetrardekk á Dekksentrinum í Havn*

*Mynd: Terji Nielsen*

Mánamorgunin var rættuliga hált ymsastaðnis kring landið, og onkur bilur fór eisini út av vegnum. Hetta var fyrsta ávaringin til føroysku bilførararnar um, at veturin er í nánd, og sum vant er, førdi hetta eisini til rættuligan telefonstorm á dekkverkstøðini kring landið.

Á dekkverkstøðunum verður sagt, at hesa vikuna hava teir havt úr at gera, og telefonin kimar støðugt. Fólk bíða við at skifta dekkini, til hálkan hevur gjørt vart við seg, og tí kemur alt í einum, verður sagt á dekkverkstøðunum kring landið.

## Lagaligari fyri bygdafólk

Tórshavnar Kommuna hevur gjørt av at broyta upptøkureglarnar til barnaansing, so at tað nú verður lættari hjá bygdafólki, ið hava í umbúna at flyta til høvuðsstaðin, at fáa børnini á stovn beinan vegin, tá ið flutt verður. Áður hevur tað verið so, at tað ikki hevur borið til at skriva børnini upp til barnaansing, um tú ikki ert búsitandi í kommununi. Nýggju reglurnar hava tó við sær, at bygdafólk og útisetar nú kunnu skriva børnini upp á bíðilista eitt hálvt ár, áðrenn flutt verður. Tískil skuldi tað borið til hjá teimum flestu at fáa børnini inn á stovn, so skjótt sum tey eru komin í kommununa.

tn

## Risa Trølla-Pætur show í Runavík

Leygardagin verður skipað fyri einum risastórum Trølla-Pætur tiltaki í ítróttarhøllini í Runavík. Tiltakið er í sambandi við, at tað í hesi vikuni er mentanarvika í Runavík.

Øll manningin í filmunum um Trølla Pætur og Mafiuna verða við á pallinum í Runavík leygardagin, so børnini, ið koma á vitjan, sleppa at uppliva bæði Trølla Pætur, Ommuna, Erling og Jógvan politist, Mafiuna, Kára handilsmann og Ossa.

Tiltakið verður sum áðurnevnt í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin, og tað byrjar klokkan 15. Atgongumerkir til tiltakið fáast við dyrnar ein tíma frammanundan.

tn